# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Jóhannes Eli Iversen

### til minnis

### deyður 22. december 2006



Lítið vardi tað okkum, sum vóru við bindiklubbanum í Suðuroynni síðst í mai 2006, at hetta var síðsti túrurin, vit høvdu saman við Jóhannes Eli. Sjálvt um hann hevði krím, so vildi hann so fegin koma við.

Jóhannes Eli dámdi sera væl at ganga úti í náttúruni. Nógvar ógloymandi túrar hava vit havt saman, og sum oftast var tað hann, ið legði til at fara. Nú er hann farin undan okkum sín síðsta túr - inn í ævinleikan.

Tað er helst ikki vanligt, at menn eru í bindiklubbi, og soleiðis er heldur ikki her. Fyri nøkrum árum síðani kom onkur við tí hugskoti, at menninir kundu spæla sjavs, meðan konurnar bundu, og tóku fleiri undir við tí og eru sera glaðir fyri hetta tiltak. Nú er sessurin hjá Jóhannes Eli tómur, og saknurin er stórur, men minnini eru góð.

Tað kom óvart á okkum at frætta, at Jóhannes Eli var vorðin álvarsliga sjúkur á bátaferðini í Noregi, og fylgt varð væl við, hvussu gekst, meðan hann var á sjúkrahúsi í Noregi og Danmark, men stórt var vónbrotið, tá tað frættist, at einki var at gera meira.

Hegnismaður, sum Johannes Eli var, keypti hann sær báttaskrokk úr Noregi og bygdi bátin Antares, sum er gjørdur av einslistum. Dreymurin um egnan bát gekk út, og stór var frøin, tá Antares varð sjósettur á sumri 2005. Hann gleddist um bátin og hevði ætlanir um at sigla runt oyggjarnar.

Tá ið standmyndin av Sigmundi Brestissyni varð avdúkað í Skúvoy, sigldi Jóhannes Eli, sum hevði røtur har, saman við bróður sínum við egnum báti at luttaka í hátíðarhaldinum.

Góðu Asta, Bent Levi og Elsebeth. Tit hava mist ein góðan mann og pápa. Harrin troysti og styrki tykkum í sorgini og sakninum. Asta, góða, tú vart manni tínum ein góður stuðul og vart um hann alla tíðina, hann var sjúkur, og fekk góða hjálp frá familjuni.

Góði Jóhannes Eli. Takk fyri alt, vit hava havt saman. Altíð vart tú blíður og fyrikomandi, góður í ráðum, trúgvur at vitja og fúsur at hjálpa, har ið á stóð.

Við hesum fáu orðum lýsa vit frið yvir minnið um okkara góða vin Jóhannes Eli Iversen.

**Bindiklubburin**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hugo Lind** andaðist á Åbenraa sjúkrahúsi leygardagin 27. januar, 65 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Døstrup kirkju í Suðurjútlandi fríggjadagin kl. 14.

## Dagurin

**31. januar. Vigilius,** deyður ár 405. Kemur ungur til Trient, har hann í 385 gerst biskupur. Tá ið hann á eini trúboðaraferð kollveltir eina skurðgudamynd, verður hann steinaður til deyða.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi og abbi okkara

**Hugo Lind**

Døstrup, Sdr. Jylland

andaðist á sjúkrahúsinum í Åbenrå leygardagin 27. januar 65 ára gamal

Jarðaferðin verður úr Døstrup kirkju í Suður Jyllandi fríggjadagin 2. februar kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Petra, Kim, Betina, Kenneth og Vivian**

Chevrolet Styline:

## Er hetta bilurin hjá Gunnari Stokholm?

Í sambandi við at Birgar Johannessen savnar tilfar til "Tórshavnar alfrøði", kemur hann fram á nógvar áhugaverdar myndir, og her er ein av teimum.

Myndin er av einum Chevrolet Styline frá 50-unum. Hon er tikin framman fyri klædnahandilin hjá Gunnari Stokholm við Hoydalsvegin.

Vit hava spurt fleiri "serfrøðingar" um teir kennast við hendan bilin, men enn hevur eingin endaliga kunnað staðfest hvør eigur bilin.

Tað kundi verið líkt til, at hetta er ein bilur hjá Gunnari Stokholm. Hann koyrdi annars mest við Ford bilum.

Gunnar Stokholm hevði klædnahandil við Hoydalsvegin frá fyrst í 50-unum til síðst í 60-unum. Hann andaðist í Danmark í 2003, 92 ára gamal.

Tey sum kennast við bilin á myndini eru vælkomin at ringja til Birgar Johannessen á tel. 214647 / 314647.




*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Christina Zachariasen**

andaðist jólaaftan og fór til jarðar.

Takk til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini, ervinum og á ymsan hátt.
Og til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Thommas, Marjun og Páll Zachariasen**